gult2 cyan2 magenta2 svart2

Óli Jacobsen, fakfelagsformaður:

– Hvør dagur er ein kampur

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelagi seinastu fjórðingsøldina, Óli Jacobsen, heldur ikki, at altjóða arbeiðaradagurin 1. mai hevur so stóran týdning longur, men hevur heldur súmbolskan týdning enn nakað annað

ARBEIÐARADAGURIN
Stefan í Skorini

Garvaði maðurin í føroysku arbeiðararørsluni, Óli Jacobsen, heldur ikki, at hesin arbeiðaradagurin rørir kenslurnar á sama hátt sum fyrr, tá hesin dagurin mangan kundi fáa fjøldina í kók, og hann viðgongur, at fyri hann hevur hesin serstaki dagurin ikki so stóran týdning.

At fólk ikki leggja nakað serligt í henda dagin, sæst á hvørjum ári á Vaglinum, tá tey ikki eru mong, ið halda tað vera ómakin vert at leita sær oman í býin at lýða á røðurnar.

Tó metir Óli, at tað er neyðugt hjá arbeiðarafeløgum at gera vart við seg á onkran hátt, og hetta er eitt gott høvi. Sjálvur plagar hann at leita sær niðan á Vaglið altjóða arbeiðaradagin.

Ein av orsøkunum til hetta heldur Óli vera, at so nógv av málunum hjá fakfelagsrørsluni eru nádd, og tí halda fleiri seg einki hava at stríðast fyri. Her sipar formaðurin serliga til tey ungu, ið ikki altíð eru varug við, hvat stórt arbeiði liggur aftanfyri tað vælferð, ið tey njóta.

Óli Jacobsen, formaður í fiskimannafelagnum, heldur ikki, at arbeiðaradagurin hevur eins stóra ávirkan á kenslurnar sum fyrr, men hann vísir tó á, at hvør dagur er ein kampur hjá fakfeløgunum

Kampur um hvørt komma

Tó er Óli Jacobsen ikki í iva um, at stríðið hjá fakfelagsrørsluni heldur fram.

– Hvør dagur er ein kampur fyri at vinna fram og fyri at varðveita vunnin rættindi, sigur Óli.

Hann leggur afturat, at fleiri halda, at øll úrslitini eru komin av sær sjálvum, men so er ikki. Tað er hinvegin ein kampur um hvørt komma, tí einki kemur av sær sjálvum, vísir hann á.

Óli heldur lítið um tað føroyska samfelagið, sum tað sær út í dag. Hann heldur okkum vera í marknum til eina bananrepublikk.

– Vit læra í skúlanum, at Føroyar eru so ómetaliga demokratiskar, men so er ikki, tí vit eru heldur á markinum til eina bananrepublikk.

Hetta byggir Óli á ta viðferð, fakfeløg fáa frá einum samdum løgtingi, sum ikki metir, at allir borgarar eru eins yvirfyri lógini. Óli sigur seg hava víst á, at tann føroyska demokratiska skipanin ikki riggar, sum hon skal, men eingin broyting er at hóma.

Støðið er lagt

Óli heldur, at 1. mai hevði verið eitt gott høvi hjá skúlunum at varpa ljós á fakfelagsrørsluna. Hetta kann gerast við at bjóða fakfelagsfólki til skúlarnar, og tey kunnu greiða næmingunum frá teirra virksemi og týdninginum av hesum arbeiði. Hetta hevði verið frægari enn at geva øllum frí henda dagin.

Sáttmálin hjá fiskimonnunum er til 1. desember, tá fiskimannafelagið fer í samráðingar við reiðarafelagið.

50 ár 50 ár

Móttøka

Í sambandi við at tað
í dag 1. mai eru 50 ár síðani

Leivur Ellingsgaard

byrjaði virksemi sítt í Klaksvík
verður móttøka í Skálanum
frá kl. 17⁰⁰ til 19⁰⁰

Øll eru hjartaliga vælkomin

Sp/f Leivur Ellingsgaard
700 Klaksvík

VÆSTR 457171

Flogfar vendi aftur við sjúkum monnum

Flogfarið hjá Maersk vendi sunnudagin aftur til Føroyar, tí nakrir føroyskir sjómenn vóru ógvuliga illa fyri umborð

LØGREGLUTÍÐINDI
Stefan í Skorini

Sunnudagin stóð alt løgregluliðið, bjargingarliðið og sjúkrabilar tilbúnir á flogvøllinum í Vágunum. Orsøkin var, at flogskiparin hjá Maersk hevði boðað frá, at hann vendi aftur til Føroyar, tí seks sjómenn vóru vorðnir ógvuliga sjúkir umborð.

Flogfarið hevði verið umleið ein hálvan tíma í luftini, tá flogskiparin vendi aftur, tí hann tordi ikki at halda leiðina fram til Keypmannahavnar við álvarsliga sjúkum monnum umborð.

Seinni vísti tað seg at vera talan um tveir menn, sum vóru ógvuliga illa fyri vegna ovurnýtslu av rúsdrekka. Støðan gjørdist tí ikki so álvarsom, sum fólk vóru bangin fyri. Báðir menninir vóru fluttir á landssjúkrahúsið.

Rýmdi undan løgregluni

LØGREGLUTÍÐINDI
Stefan í Skorini

Leygarmorgunin kom løgreglubilurin framá ein fórara, ið teir høvdu illgruna koyrdi við kenning. Teir elta bilin og royna at steðga honum, men fórarin setir ferð á bilin og roynir at koya undan. Hetta var í Kollafirði.

Fórarin royndi at koyra undan løgregluni, ið fór aftaná. Ferðin kom heilt uppí 180 kilometrar um tíman millum Kollafjørð og Hósvík. Tað eydnaðist so løgregluni at steðga fóraranum, og tað vísti seg, at hann var ávirkaður av rúsdrekka. Fórarin kann sostatt vænta sær at missa koyrikortið.

Annars hevur verið nakað av húsaófriði í Havnini, og tríggir mans vóru tiknir inn á støðina at sova rúsin av sær.

Ferðmátingar í Sundalagnum

LØGREGLUTÍÐINDI
Stefan í Skorini

Løgreglan í Eysturoynni gjørdi fríggjadagin ferðmátingar í Sundalagnum. Ferðin á hundrað bilum varð mátað, men bara ein bilførari var uppskrivaður.

Hóast fongurin hjá løgregluni var lítil, so má hetta sigast at vera góð tíðindi, at so fá trýstu ov hart á spitaran.

Annars sigur løgreglan í Eysturoynni frá einum friðgarligum vikuskiftið, og tað sama er at frætta úr Klaksvík.

gult3 cyan3 magenta3 svart3

Góð TILBOÐ í Miklagarði...

TILBOÐ
Angus
Búffur av tjúksteik
1/2 kg.
39⁹⁵
Kiloprísur: 79,90

TILBOÐ
Risi Frutti
3 fyri
18⁰⁰

Golden Delicius,
Granny Smith
ella Red Delicius
Súrepli
Frítt val
Posi 1,5 kg.
12⁹⁵
Kiloprísur: 8,63

TILBOÐ
Yes uppvask
500 ml.
12⁹⁵

Estrella
Taffel Chips
300 gr.
9⁹⁵

Melis
Sukur
2 kg.
6⁹⁵

TILBOÐ
Faxe Kondi
2x 1,5 ltr.
19⁹⁵ + pant

Tilboðini eru galdandi frá týsdegnum 1. mai
til og við leygardegnum 5. mai 2001

MIKLAGARÐUR
SMS • Saltangará

petur & petur • 320870